# Chrysler aftur amerikanskt

Níggju ár eftir samanleggingina av týsku Mercedes verksmiðjuni Daimler-Benz og amerikonsku bilverksmiðjuni Chrysler Corporation í 1998, eru Chrysler nú aftur á amerikanskum hondum.

Amerikanska íleggingarfelagið Cerberus Capital Management hevur gjøgnum eitt dóttirfelag yvirtikið 80,1 prosent av partabrøvunum í Chrysler-konsernini. Keypsprísurin var 5,5 milliardir evrur – umleið 41 milliardir krónur. Daimler-Chrysler í Stuttgart í Týsklandi eiga nú 19,9 prosent av partabrøvunum. Hetta upplýstu stjórin í Daimler-Chrysler, Dieter Zetsche, og stjórin í Cerberus Capital Management, John Snow, á tíðindafundi.

Chrysler framleiða bilmerkini Chrysler, Dodge og Jeep.

**mg**



*Chrysler 300 C*



*Daimler-Benz í Tysklandi*



*Chrysler Corporation í USA*

# Skoda Octavia Scout

Skoda Octavia stationcar fáast nú í eini Scout 4x4 útgávu, sum er hægri frá vegnum og sær út sum ein »off-roadari«.

Octavia Scout fæst við tveimum ymiskum bensin og dieselmotorum:

2.0 FSI (Bensin) við 150 hk, og 2.0 TDI PD (diesel) við 140 hk, báðir við fýra sylindarum og 6-trins girkassa. Diesel útgávan hevur sótfiltur sum standard.

Bilurin eitt framkomið 4x4 system, har drívmegin til bakhjólini verður elektroniskt aktiverað eftir koyriumstøðunum. Umframt Octavia fæst Skoda Roomster eisini í eini Scout útgávu.

**mg**




*Skoda Octavia Scout hevur eitt framkomið 4x4 system, har drívmegin til bakhjólini verður elektroniskt aktiverað eftir koyriumstøðunum. 17" hjól og alufelgur eru standard*

# Fólkavognar á innlandsísinum



Áðrenn nýggir bilar koma á marknaðin, verða teir royndarkoyrdir undir nógvum ymiskum umstøðum, bæði í nógvum hita og nógvum kulda.

Í Grønlandi hevur VW-konsernin eina stóra breyt til royndarkoyring av sínum nýggju bilum inni á innlandsísinum. Bilarnir koma við flogførum til Syðra Streymfjørð og verða síðan koyrdir inn á innlandsísin, har teir teir verða royndarkoyrdir í kulda og torførum umstøðum.

**mg**